MENTAMÁLARÁÐIÐ

# Starv sum skúlastjóri í Skúlanum við Streymin

Hevur tú hugsjónir um skúlamenning og áhuga og hegni at átaka tær leiðslustarv í føroyska fólkaskúlanum, so hevur tú møguleika at søkja starvið sum skúlastjóri í Skúlanum við Streymin, sum fatar um allan skúlabygnaðin í Sunda kommunu.

Hetta er eitt spennandi starv við nógvum avbjóðingum, har tú skalt mynda nýggja skúlan og skipa tilgongdina at samansjóða starvsfólk og næmingar, taka lut í byggiviðgerðini við atliti at undirvísingarskipan, innrætting, innbúgvi og amboðum og leggja námsfrøðiligu kós skúlans.

Í skúlanum eru 286 næmingar í 1. – 10. flokki, og 23 lærarar eru í føstum starvi í skúlanum. Starvið verður sett frá 1. januar 2016 ella skjótast gjørligt.

Skúlin við Streymin er ein nýggjur skúli, sum umfatar allir núverandi skúlar í kommununi. Staðsetingin av undirvísing kann verða ávirkað av § 29, stk. 5 í fólkaskúlalógini.

**Um starvið**
Skúlastjórin hevur fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna og ábyrgd av virksemi skúlans. Høvuðsuppgávurnar eru:

- at standa á odda fyri fakligari og námsfrøðiligari menning
- at inna eina mennandi starvsfólkaleiðslu og virka fyri, at lærarar skúlans hava umstøður fyri fakligari menning
- at skapa virðing fyri skúlanum og umstøður hjá tí einstaka fyri ávirkan og samábyrgd
- at fremja gott samstarv millum skúla og heim og eggja næmingum og foreldrum at fáa sum mest burtur úr skúlagongdini bæði fakliga og sosialt

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava fólkaskúlalæraraútbúgving, starvsroyndir í fólkaskúlanum umframt leiðsluroyndir. Tað er ein fyrimunur, at umsøkjarar hava leiðsluútbúgving.
Persónligar dygdir hjá umsøkjarum eru:

- góð leiðslu- og samstarvsevni, umframt mennandi leiðslustíl
- vilja og evni at royna nýggjar leiðir
- áhuga fyri avbjóðingum
- góðan málførleika, serliga í føroyskum.

**Setanarviðurskifti**
Setanarøkið er undir Mentamálaráðnum við fyribils tænastu í Skúlanum við Streymin. Tann, ið settur verður, eigur at tola broytingar í starvinum. Starvið er flokkað í lønarflokkinum 36.1 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag, og er lønin kr. 39.845,04 umframt 17% í eftirløn.

**Umsóknir**
Umsókn saman við avriti av lærarаprógvi, C.V. og møguligum viðmælum skal verða Mentamálaráðnum í hendi **í seinasta lagi 17. november 2015 kl. 12.00.**

**Umsóknin verður stílað til:**
Mentamálaráðið
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn
ella við t-posti: mmr@mmr.fo

Tey, ið ynskja fleiri upplýsingar um starvið, kunnu ringja til Jenny Lydersen, undirvísingarleiðara, tlf. 555044 ella Olaus Jespersen, deildarstjóra, tlf. 555045.

***Mentamálaráðið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum og øðrum frítíðarvirksemi.*